# Fólkaskúladeildin sníkir næmingatalið upp

**– Gularótin við nýggja tímabýtislykilinum er, at um tveir næmingar verða trýstir inn í hvønn flokk afturat, fær yvirfylti flokkurin nakrar fáar eykatímar, sigur Elsa Birgitta P. Petersen, forkvinna í Føroya Lærarafelag**



*– Er ætlanin, at hækkaða næmingatalið skal fíggja tann nýggja tímabýtislykilin, so hann verður útreiðsluneutralur, spyr Elsa Birgitta P. Petersen, forkvinna í Føroya Lærarafelag*

FÓLKASKÚLIN
*Turið Kjølbro*

Fólkaskúladeildin í Mentamálastýrinum roynir at sníkja hámarkið fyri næmingatal í fólkaskúlanum upp. Tað heldur forkvinnan í Føroya Lærarafelag, Elsa Birgitta P. Petersen, nú tímabýtislykilin verður broyttur.

– Við at lova skúlaleiðslunum nakrar tímar afturat, roynir Fólkaskúladeildin at hækka hámarkið í flokkunum í fólkaskúlunum gjøgnum bakdyrnar, sigur Elsa Birgitta P. Petersen.

Fólkaskúlalógin ásetur, at við skúlaársbyrjan eigur næmingatalið vanliga ikki at fara upp um 24 í hvørjum flokki.

– Hetta heldur ikki sambært nýggja tímabýtinum. Fólkaskúladeildin eggjar við nýggja tímabýtislyklinum til, at næmingatalið fer upp um hetta. Gularótin er, at um tveir næmingar verða trýstir inn í hvønn flokk afturat, fær yvirfylti flokkurin nakrar fáar eykatímar.

Og av tí, at støðan í fólkaskúlanum viðvíkjandi tímum er sera trong, kann hetta hava við sær, at skúlaleiðslur lata seg tøla.

Forkvinnan í Føroya Lærarafelag setur spurnartekin við, um skúlaleiðslurnar góðtaka hesa víðkan.

– Gera skúlarnir, sum Fólkaskúladeildin leggur upp til, hava vit góðtikið, at tað ikki er eitt undantak, at næmingatalið fer upp um 24, men vit geva loyvi til, at regulin verður, at næmingatalið, eisini við skúlaársbyrjan, fer upp á 26 næmingar í flokkunum. Tá slíkt verður gjørt, verður tað ofta til eina siðvenju og síðani til lóg.

Í farnu viku viðgjørdi løgtingið eitt uppskot, um næmingatalið í flokkum fólkaskúlans eigur at setast niður. Tað fall.

– Meðan orðaskifti hevur verið í løgtinginum um næmingatalið, hevur Fólkaskúladeildin – við vælsignilsi frá landsstýrismanninum – arbeitt við tí mótsetta, sigur Elsa Birgitta P. Petersen.

Hon vil vera við, at Fólkaskúladeildin hevur eina fjalda ætlan aftan fyri tann nýggja tímabýtislykilin.

– Er ætlanin, at hækkaða næmingatalið skal fíggja tann nýggja tímabýtislykilin, so hann verður útreiðsluneutralur? Føroya Lærarafelag, skúlaleiðslur og lærarar hava kravt, at tímabýtislykilin skal broytast. Nú heldur Mentamálastýrið, at vit eiga at verða nøgd. Aðrastaðni verður hetta kallað manipulatión.

– Tann einstaki næmingurin hevur krav uppá, at hann fær nakað burturúr skúlagongdini, sigur nýggja fólkaskúlalógin. Nú kunnu vit av álvara seta spurnartekin við, um lærararnir verða førir fyri at geva hvørjum næmingi sítt, tá flokkarnir verða enn meira yvirfyltir. Og hvussu verður skúlin førur fyri at uppfylla treytirnar fyri, at skúlin er fyri øll, tá myndugleikin er tann fyrsti til at undirmeta lógina. Skúlastovurnar eru als ikki gjørdar til flokkar við 26 næmingum og kanska fleiri.

## Tøkk

Hjartans tøkk til øll tykkum, sum við fjarritum, blómum, vitjanum og gávum gjørdu mær 80 ára føðingardagin so hugnaligan og ógloymandi.

*Vinarligar heilsanir*
**Mathilda Tausen**

## Tøkk

Hervið vilja vit takka øllum, sum fylgdu góðu mammu, vermammu, ommu, langommu og oldurommu okkara

***Andreu Sivertsen***
við Gjógv

til gravar.

Tøkk fyri blómur, kransar og gávur til Gjáar kirkju.

Ein serstøk tøkk verður veitt heimahjálpunum og teimum, ið vóru um hana á Umlættingarheiminum í Gøtu.

Gleðiligar páskir

vegna familjuna
***Anna, Petur Jacob, Maria og Páll***

# Nógvir batar í nýggja tímabýtislykilinum

**– Nýggja tímabýtið er nógv rættvísari enn tað, sum er galdandi. Tað javnsetur næmingar í 1.-7. flokki, leggur upp fyri flokkatali skúlans, umframt at eitt nøktandi tímatal verður veitt 8.-10. flokki, sigur Óli Holm, landsstýrismaðurin í mentamálum, sum vísir aftur, at økt næmingatal í flokkunum skal fíggja nýggja tímabýtislykilin**



*Landsstýrismaðurin vísir aftur, at økt næmingatal í flokkunum skal fíggja nýggja tímabýtislykilin*

FÓLKASKÚLIN
*Turið Kjølbro*

– Í fólkaskúlalógini stendur, at næmingatalið vanliga ikki eigur at fara upp um 24 næmingar. Lógin er ikki broytt, og ein broyttur tímabýtislykil kann ongantíð broyta eina skúlalóg. Í grundini hevur nýggi tímabýtislykilin einki við næmingatalið 24 at gera. Tað er púra misskilt. Nýggja tímabýtið er nógv rættvísari enn tað, sum er galdandi. Tað javnsetur næmingar í 1.-7. flokki, leggur upp fyri flokkatali skúlans, umframt at eitt nøktandi tímatal verður veitt 8.-10. flokki. Harafturat verður eisini lagt upp fyri p-fakskipan í handaverk og list, miðfirraðari serundirvísing og bókasavnstímum, sigur Óli Holm.

Frá komandi skúlaári fáa skúlarnir kring landið, sum hava fleiri enn 70 næmingar, ein nýggjan tímabýtislykil at arbeiða út frá. Hetta hevur verið eitt ynski frá skúlum og lærarum í nógv ár. Sum er verður tímabýtið roknað eftir næmingum, meðan tann nýggi tekur atlit til flokkar. At næmingatal í førum kann sambært nýggja býtinum fara upp um 24 næmingar til 25 ella 26, hevur loypt øði í Føroya Lærarafelag og skúlaleiðarar. Hesi fara so langt sum at kalla hesa mannagongdina fyri manipulasjón.

Spurdur um vandi ikki er fyri, at tað verður siðvenja, at næmingatalið fer upp um 24, sigur landsstýrismaðurin.

– Tímabýtislykilin hevur einki við hatta at gera. Hann snýr seg um at tilluta nakrar tímar eyka. Skúlaleiðslurnar gera av, annaðhvørt flokkarnir hava 24 ella 25 næmingar. Í løtuni eru 19 flokkar í landinum, sum hava hægri næmingatal enn 24, eftir nýggja tímabýtinum verða flokkarnir 20 í tali, sum hava hægri næmingatal enn 24. Nýggja tímabýtið leggur upp til, at um tað í einstøkum føri ber til at fara upp um 24 næmingar í flokkum, fær flokkurin nakrar eyka tímar. Tímar verða ikki latnir til nýggjan flokk, fyrr enn næmingatalið fer upp um 26, sigur Óli Holm.

Landsstýrismaðurin vísir aftur, at økt næmingatal í flokkunum skal fíggja nýggja tímabýtislykilin.

– Als ikki. Sum eg havi skilt tað, er Føroya Lærarafelag samt við Mentamálastýrinum í nýggja tímabýtinum, burtursæð frá tí, at tey halda fast við, at tað ongantíð skulu vera fleiri enn 24 í hvørjum flokki.

Í trivnaðarkanningini hjá Føroya Lærarafelag kemur fram, at nógvir lærarar meta, at tað er trupult at hava eina næmingalagaða undirvísing í skúlanum. Spurdur um Mentamálastýrið ikki átti at miða eftir lægri næmingatali í flokkunum ístaðin, soleiðis at lærarin betur kann taka støði í hvørjum næmingi, sigur Óli Holm.

– Tað er altíð ynskiligt at hava færri næmingar í flokkinum. Spurningurin er, hvat tað rætta talið er. Eg eri ikki so vísur í, at tað ikki ber til at hava eina nøktaða undirvísing í flokkum við 20-24 næmingum. Men tað er rætt, at tað er trupult at taka atlit til allar næmingar, tá ið 24 næmingar eru í flokkinum.

Fólkaskúladeildin viðger í løtuni viðmerkingarnar, sum eru komnar frá skúlaleiðslum kring landið. Viðmerkingar eru serliga til tað óhepna í, at 8. og 9. flokkur bert fáa 34 tímar. Landsstýrismaðurin roknar við, at tað fer at bera til at fáa tímatalið til hesar flokkar nakað upp.

Skúlar við lægri næmingatali enn 70, eru ikki umfataðir av nýggja tímabýtislykilinum. Teir fáa eisini fleiri tímar at ráða yvir frá komandi skúlaári at rokna. Landsstýrismaðurin ætlar, at skúlarnir fáa nýggja tímabýtislykilin beint eftir páskir.



# Góðar tíðir á føðideildini

FØÐING
*Orð: Ingrid Bjarnastein*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

Á føðideildini er nógv at gera frá degi til dags. Arbeiðstíðirnar eru bæði nátt og dag, tí spurt verður ikki eftir nær best liggur fyri at koma í verðina.

Í gjár vóru 131 børn fødd higartil í ár, og júst sama dato í fjør var talið júst tað sama. 36 av hesum eru fødd í mars mánaða.

Ruth Vang, ljósmóðir og Sonja Andreassen, deildarsjúkrasystir, greiða frá:

– Nógv er at gera, men ikki so nógv, sum fólk vilja vera við. Á føðideildini hava vit góðar tíðir og verri tíðir. Men higartil í ár er tað bara komið fyri einaferð at fimm børn eru fødd sama dag, harav var eitt tvíburðapar. Tað er ikki fyrr enn talið kemur upp á 6-8 føðingar um dagin, at vit siga, at nógv er at gera.

– Fyrr varð sagt, at apríl og september vóru mánaðar har eyka nógv børn vórðu fødd. Tað er jú níggju mánaðar aftaná ávíkavist summar- og jólafrítíðina. Men soleiðis er tað ikki longur – nú er streymurin meira javnur.

So verkfallið, sum var fyri níggju mánaðum síðani hevur ikki ávirkað burðartalið í Føroyum nakað serligt.



*14. mars kom hesin lítli beiggin í verðina. Foreldrini hjá honum eita Miriam Jacobsen og Jan í Nesinum, bæði úr Havn.*



*Molly Jacobsen, Skopun og Magni Johannesen, Toftir, fingu 15. mars hesa lítlu diddluna.*



*Henda fittan diddan var bert eitt lítið døgn tá henda myndin varð tikin. Foreldrini eru Bettina Bruun og Jan Müller, bæði úr Vestmanna. Hon eigur tvey systkin, Magnus og Cecilie.*

